Privat samfer›sla má hava stór feløg

Landsst‡risma›urin í vinnumálum, Bjarni Djurholm, vil hava føroyska samfer›slukervi› í mest møguligan mun á privatar hendur. Stjórin á SL, Reidar Nónfjall, tekur undir vi› hugskotinum um talan ver›ur um stór privat feløg

PRIVATISERING
John Johannessen

Bjarni Djurholm, landsst‡risma›ur, hevur gjørt eitt lógaruppskot um at privatisera innanlands fólka- og farmaflutningin í mest møguligan mun.

Hetta, heldur landsst‡risma›urin, kann rationalisera samfer›slukervi›, samstundis sum tænastustø›i› fer at hækka.

Stjórin á Strandfaraskipum Landsins, Reidar Nónfjall, tekur undir vi› hugskotinum. Men hann heldur, at ávísar treytir skulu uppfyllast, skal ta› loysa seg at privatisera samfer›sluøki›.

– Endamáli› vi› at privatisera er, at tænastan skal gerast betur og at samfer›sluøki› skal gerast bíligari at reka. Men hetta ber ikki til, uttan ta› ver›a stór feløg, i› koma at reka uppgávurnar, sigur Reidar Nónfjall.

Hava royndir

Bygdalei›ir ver›a samskipa›ar av Strandfaraskipum Landsins, men ta› eru privat feløg, i› reka lei›irnar. Hetta hevur stjórin á Strandfaraskipum Landsins ringar royndir av.

– Vit hava í dag 29 avtalur vi› privatar, i› koyra fyri Bygdalei›ir. Hetta er naka›, i› hevur gjørt raksturin nógv d‡rari, enn hann hev›i veri›, um vit høvdu fáar avtalur, sigur Reidar Nónfjall.

Stjórin á SL vísir til eina kanning, sum er gjørd í Noreg um rationalisering av busskoyring. Hendan frágrei›ingin sigur, at hvør arbei›stakari má koyra 1,5 milliónir kilometrar um ári›, skal talan vera um rationellan rakstur.

Bussarnir hjá Bygdalei›um koyra 3 milliónir kilometrar um ári›. Tí skuldu bert tvey feløg koyrt fyri Bygdalei›ir, um gingi› var› eftir hesari kanningini.

Hetta heldur Reidar Nónfjall eisini vera rætt. Tí fleiri arbei›stakarar d‡rka bara um avtalurnar og kosta nógv í umsiting, heldur hann.

Gongur ta› sum landsst‡risma›urin í samfer›slumálum ætlar, ver›a skulu svørt hvítu skipini hjá Strandfer›sluni á privatar hendur

Eftirlitsstovnur

Ver›ur føroyska samfer›slukervi› ella partar av tí privatisera›, kemur Strandfaraskip Landsins at virka sum ein eftirlitsstovnur.

– Vit koma at hava eftirlit vi›, at farlei›irnar ver›a røktar og vit koma at leggja lei›irnar til rættis og hava yvirskipa›u st‡ringina av samfer›sluøkinum, sigur Reidar Nónfjall.

Stjórin á Strandfaraskipum Landsins vísir á, at í londum, har samfer›slukervi› ver›ur røkt av privatum feløgum, er vanligt vi› slíkum almennum stovnum, sum samskipa og hava eftirlit vi› samfer›sluni.

Hetta merkir, at Strandfaraskip Landsins ver›ur ein almennur myndugleiki, sum er arbei›sgevari hjá teimum, i› røkja farlei›irnar.

Jazzkonsertir í Klingruni

Nor›urlandahúsi› hevur tiki› stig til at hava nakrar jazzkonsertir veturin 2000/2001 og hevur í hesum sambandi heitt á Føroya Jazztónleikarafelag um samstarv.

Tann fyrsta konsertin var hildin 17. oktober. Á skránni spældu 3 jazzættarli›. Stamen Stantchev og Edward N. Debess spældu saman vi› Jassarunum og Tangz. Solistar vóru: Christoffer Olsen, alt saxofon, Tróndur Olsen, trom-pet og Finnur Jensen, floytu og Magnus D. Madsen, trummur.

Ein konsert var hildin 15. november, har i› luttakararnir vóru royndir tónleikarar og ung gávurík innan jazz. Tey, sum spældu hetta kvøld vóru Stamen Stantchev, klaver, Nikolaos Kapnas, violin, Edward Debes, bass og Bo Isholdm, guitar. Tey ungu vóru Ása Johannessen, altsaxofon, Ida Holm Berner, altsaxofon, Teitur Herup Olsen, altsaxofon og Magnus Debess Madsen, trummur.

Í 1. ársfjór›ingi 2001 er ætlanin er hava tvær konsertir. Tann fyrra konsertin ver›ur sunnudagin 28. januar 2001 kl. 19.30 og hin seinna ver›ur sunnudagin 25. mars 2001 kl. 16.00.

Eftir ætlan hjá Nor›urlandahúsinum fara føroyskir jazztónleikarar eisini at spæla uttanlands og rokna› ver›ur vi›, at einir 6 persónar fáa møguleika at spæla uttan fyri landoddarnar.

Samskipari Føroya Jazztónleikarafelags er Brandur Øssursson.

Skráin fyri konsertina januar 2001 ver›ur l‡st í skránni fyri januar 2001 og skráin fyri konsertina mars 2001 ver›ur l‡st í skránni fyri mars 2001.

Tiltaki› vi› jazzkonsertum er vor›i› heilt væl móttiki›. Ta› vísir seg, at fólki dáma væl tann gó›a stemningin í Klingruni, serliga tá i› er opi› út í Kafeteria, og at ta› ber til at fáa sær okkurt leskiligt afturvi› konsertini.

Møguliga fara nakrar av konsertunum eisini at ver›a á bygd.

Tingmenn ónøgdir vi› avsláttarskipan

Ta› elvdi til ónøgd millum tingmenn, tá ta› t‡sdagin kom fram, at ein ávísur bólkur fær avsláttur á einari farlei› hjá Strandfer›sluni

SAMFER‹SLA
Magnus Dam

Øll skulu vera líka fyri lógini, og ta› eru tey ikki, um nøkur sleppa bíligari enn onnur vi› farlei›unum hjá Strandfaraskipum landsins. Hetta vóru fleiri tingmenn á einum máli um, tá i› Bjarni Djurholm, landsst‡risma›ur, svara›i einum fyrispurningi frá Jóanis Nielsen, løgtingsmanni, t‡sdagin.

Strandfaraskip landsins hava í eina tí› koyrt eina royndarverkætlan, har nøkur starvsfólk hjá Atlantic Airways hava roynt eina n‡ggja elektóniska gjaldsskipan. Hesi starvsfólkini hava vi› einum elektróniskum gjaldskortini fingi› avsláttur á floglei›ini í eina tí›. Bjarni Djurholm er ikki grei›ur yvir, hvussu leingi skipanin hevur veri› í gildi, men hann uppl‡sti í tinginum í gjár, at verkætlanin nú er li›ug, og at hesi fólkini tískil ikki longur fáa avsláttur vi› floglei›ini.

Fleiri tingmenn hildu ta› vera løgi›, at ein ávísur bólkur skal fáa avsláttur vi› Strandfer›sluni, me›an øll onnur skulu gjalda fullan prís fyri at fer›ast.

Svari› hjá landsst‡rismanninum var bert f‡ra reglur, og fleiri tingmenn sókna›ust tí eftir fleiri uppl‡singum um avsláttarskipanina. Onkur helt fyri, at svari› setti fleiri spurningar enn ta› svara›i, men landsst‡risma›urin kundi bert vísa til svari›, sum hann hev›i fingi› frá lei›sluni í Strandfer›sluni.

Tingmenn hildu ta› eitt nú vera løgi›, at skipanin helt uppat aftur, júst sum Jóanis Nielsen setti fram fyrispurningin, og onkur teirra vildi vera vi›, at hetta ikki er tann einasta avsláttarskipanin, sum Strandfer›slan bjó›ar ávísum bólkum.

Bjarni Djurholm lova›i at kanna máli› nærri og millum anna› kanna, hvat úrslit Strandfer›slan er komin til vi› elektrónisku avsláttarskipanini, sum nú hevur veri› roynd.

Ov d‡rt at inniloka Tjørnuvíkarvegin

Ta› fer at kosta ov nógv at inniloka ein part av vegnum til Tjørnuvíkar

SAMFER‹SLA
Magnus Dam

Í sta›in fyri hevur Landsverkfrø›ingurin saman vi› Haldarsvíkar kommunu tiki› avger› um at brei›ka eitt 45 metrar langt vegastrekki í Lí›ini, naka› omanfyri Lundagjógv. Hetta arbei›i› fór í gongd 1. november, og eftir ætlan ver›ur ta› li›ugt á›renn árslok.

Ta› uppl‡sir landsst‡risma›urin í samfer›slumálum, Bjarni Djurholm, í einum svari uppá fyrispurning frá Jákup Suna Joensen úr Fólkaflokkinum.

Jákup Suni Joensen vildi hava at vita, um ta› ber til at leggja ein part av vegnum undir hálvtekju av stáli fyri at verja vegastrekki› móti omanlopi og grótskri›u. Talan er um eitt vegastrekki›, sum er umlei› 300 metrar langt.

Bjarni Djurholm uppl‡sir, at Landsverkfrø›ingurin hevur kanna›, um ta› ber til at tekja ein part av vegnum, men kanningarnar vísa, at hetta ver›ur ov kostna›armiki› samanbori› vi›, hvat ein tunnil til Tjørnuvíkar kostar. Kostna›urin fyri at inniloka ein metur av vegi er tvífalt so stórur sum at gera ein metur av tunnli.

– Tískil er hendan loysnin ikki kanna› nærri, sigur Bjarni Djurholm í svarinum.

400.000 krónur eru settar av til at bøta um umstø›urnar á Tjørnuvíkarvegnum í ár, og ta› eru hesir pengarnir, sum Landsverkfrø›ingurin nú brúkar til at brei›ka vegin omanfyri Lundagjógv.

Katrin fekk rós

Uppskoti› hjá Katrin Dahl Jacobsen um at styrkja reglurnar móti kynsligum ágangi fekk rós frá øllum flokkum undir fyrstu vi›ger›

LÓGARUPPSKOT
John Johannessen

Ta› var brei› undirtøka frá øllum flokkum á løgtingi, tá uppskoti› hjá Katrin Dahl Jacobsen um at leingja fyrningarfreistina og at stykja reglurnar móti kynsligum ágangi var til fyrstu vi›ger›ar í tinginum t‡sdagin.

Katrin Dahl Jacobsen mælir til at seta í gildi vi› kongaligari fyriskipan eina broyting, sum danska fólkatingi› hevur gjørt í revslilógini, i› skal styrkja møguleikarnar hjá kynsliga misn‡ttum at fáa tey, i› hava fram ágangin dømd.

Uppskoti› mælir til, at fyrningarfreistin ver›ur fyri kynsliga misn‡tslu ver›ur longd, so tann órætta›i kann melda ágangin líka til hann er fyltur 28 ár. Fyrningarfreistin skal nevniliga vera 10 ár frá tí degi persónurin er fyltur 18 ár, hóast ágangurin møguliga er framdur, tá perónsónurin var 7 ár.

Katrin Dahl Jacobsen mælir eisini til at banna barnaporo. Galdandi lóggáva í Føroyum sigur einki um, at ta› er forbo›i› at eiga barnapornografiskt tilfar í Føroyum.

Men ver›ur uppskoti› hjá Katrin Dahl Jacobsen samtykt og ríkislógartilmæli› sett í gildi fyri Føroyar, ver›ur ta› revsivert at liggja inni vi› barnaporno.

Uppskoti› er nú beint í rættarnevndina. Og eftir or›askiftinum at døma, ver›ur uppskoti› samtykt, tá ta› kemur til a›ru vi›ger›ar.

Søkja um loyvi til eftirskúla

Landsst‡risma›urin í undirvísingarmálum skal skjótt taka stø›u til eina umsókn um at loyva einum eftirskúla í Føroyum

EFTIRSKÚLAR
Magnus Dam

Ein arbei›sbólkur fyrireikar í løtuni at seta á stovn ein eftirskúla í Føroyum, og sambært einum svari uppá fyrispurning frá Álvur Kirke, fær landsst‡risma›urin í undirvísingarmálum í næstum eina umsókn um at loyva einum eftirskúla í Føroyum.

Lóg um eftirskúlar var› samtykt í Løgtinginum í mai í ár, og hon kom í gildi 1. august í ár. Landsst‡risma›urin skal gó›kenna ein eftirskúla, á›renn farast kann undir undirvísingina. Vi›víkjandi fríkúlum, hevur landsst‡risma›urin fingi› eitt álit og eitt uppskot um lóg um fríkúlan, men enn er máli› ikki li›ugt vi›gjørt.

Torbjørn Jacobsen sigur í svarinum til Álv Kirkse, at regvluverki› er fyrireika›, men tann politiska vi›ger›in í samgonguni er ikki li›ug.

– So skjótt, hon er li›ug, ver›ur stø›a tikin til, um uppskot um løgtingslóg um fríkúlar ver›ur løgd fyri Føroya Løgting, sigur Torbjørn Jacobsen.

Keyp jólagávuna nú og ger kvettið

Adidas dúnjakki børn fyrr 599,- nú 399,-
Adidas microdrakt vaksin fyrr 799,- nú 399,-
Adidas frítíðarsett vaksin fyrr 799,- nú 399,-
Adidas sweatshirt børn fyrr 299,- nú 150,-
Nike dúnjakki vaksin fyrr 1.599,- nú 799,-
Blusur av útlendskum liðum ÷40%
Adidas sokkar ym. std. 1par 79,- 2 pør nú 100,-
Adidas samba skógvar børn fyrr 299,- nú 199,-
Adidas samba skógvar vaksin fyrr 399,- nú 299,-
Adidas response skógvar børn fyrr 499,- nú 250,-
Puma skógvar børn fyrr 299,- nú 150,-
Puma renniskógvar fyrr 399,- nú 250,-
Puma innanduraskógvar fyrr 448,- nú 250,-

Og mong onnur góð tilboð.
Tilboðini eru galdandi hesa vikuna

ÍTRÓTTUR Á GLYVRUM
Tel. 44 73 99